Landsbanki Føroya
Governmental Bank

Vinnumálaráðið
Postrúm 377, Tinganes
FO-110 Tórshavn

Tórshavn, 05-02-2007
Jnr. 2003-32-264

**Uppskot til nýggja kappingarlóg til hoyringar.**

Tikið verður undir við uppskotinum um nýggja kappingarlóg, herí heimildini til at nokta fyri samanlegging av fyritøkum, um samanlagda fyritøkan væntast at forða virknari kapping.

Tikið verður undir við gundgevingunum í almennu viðmerkingunum, hví tað er neyðugt at virka fyri virknari kapping.

Eisini kundi verið umhugsað, at seta heimild í lógina, sum heimilar kappingarmyndugleikanum at áleggja stórfyritøkum at skilja sundur og selja partar av fyritøkuni, um tílíkt tiltak kundi skapt meira virkna kapping. Hesin møguleikin kundi gjørt tað lættari at góðkent samanlegging við treyt um, at fyritøkan kann fáa álagt at skilja sundur aftur, um samanleggingin fær óynsktar fylgjur fyri kappingina. Somuleiðis kundi tað t.d. verið lættari at selt Føroya Tele saman við netinum, um kappingarmyndugleikin samstundis gjørdi vart við, at fyritøkan kann fáa álagt at skuilja sundur aftur, um sølan fær óhepnar fylgjur fyri kappingina á økinum.

Blíðar heilsanir
LANDSBANKI FØROYA

Sigurd Poulsen

Müllers Hús – Gongin
P.O.Box 229
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 308120
Fax +298 318537
landsbank@landsbank.fo
http://landsbank.fo